TJÓÐSAVNIÐ

Tilfeingis- og vinnumálaráðið

Hoyvík 29 januar 2026
J.nr.: 26/02530-2
Málsviðgeri: LJH

Viðv: Viðmerking til Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fuglaveiðu v.m. (Heimildin at skjóta grágás verður longd)

Uppskot til broyting í tekstinum: "§ 1. Í løgtingslóg nr. 66 frá 5. mai um broyting..." verður til "§ 1. Í løgtingslóg nr. 66 frá 5. mai 2021 um broyting..."

Tað hevði verið gott við greiðari orðingum í almennu viðmerkingunum. Eitt nú stendur at *vinnuligur landbúnaður hevur stóran fíggjarligan miss* og at *frítíðarlandbúnaður er fyri missi* og at *grundaðir trupulleikar standast av grágásini*. Her hevði verið gott at nevnt nakað um minstamark fyri einum loyvi at skjóta grágás. Eitt nú eigur loyvið neyvan at vera givið um eitt gásapar legst í eina veltu og eigarin einki ger fyri at fyribyrgja hetta. Hóast tað møguliga er greitt í innanhýsis mannagongdum í samband við loyvisgeving, so er hetta óneyvt.

Síðan avtala er gjørd við Búnaðarstovuna hevur Tjóðsavnið talt grágæs á hvørjum árið og hevur nú lagt seg eftir eini ávísari mannagongd, sum skal geva samanberilig úrslit ár um ár. Soleiðis, at tað við tíðin skal tað bera til, at meta um gongdina hjá grágásastovninum.
Tjóðsavnið hevur havt fundir við serfrøðingar í Danmark, Skotlandi og Íslandi. Tað vísir seg, at hóast tey í Skotlandi og Íslandi hava talt í áratíggju, so dragast tey framvegis við at finna mannagongdir, sum geva tey úrslitini tey ynskja. Tjóðsavnið hevur eisini brúkt undanfarnu árini til, at gera sær royndir við hvørji úrslit kunnu fáast og hvussu nógvar arbeiðsorku tey krevja.
Sum dømi um úrslit ið miðast kunnu eftir eru t.d.: tal av reiðrandi pørum; tal av ungum, sum koma undan; hvussu nógvar grágæs liggja fjaðursárar á ymsum vøtnum, og so framvegis.
Ásannandi at føroyski grágásastovnurin er ein partur av tí bretskt-íslendska vil Tjóðsavnið tryggja sær, at føroysku úrslitini, sum verða fingin til vega, eisini kunnu brúkast saman við bretsku og íslendsku úrslitunum.
Sum tað stendur í almennu viðmerkingunum, so tekur tað eitt ávíst áramál áðrenn teljingarnar kunnu byrja, at vísa eina stovnsgongd. Hestar teljingarnar kunnu tó ikki einans vera endurtiknar fimta ella tíggjunda hvørt ár. Tað gevur ikki nøktandi innlit í gongdina hjá stovninum. Umframt tað so er tað í nógvar mátar betur við áhaldandi arbeiði, heldur enn arbeiðið sum verður niðurlagt og tikið upp aftur við millumbilum. Teljingarnar eiga tískil at vera gjørdar á hvørjum ári.

Vinarlig heilsan

Janus Hansen

TJÓÐSAVNIÐ | FAROE ISLANDS NATIONAL MUSEUM NATURE AND CULTURE
Kúrdalsvegur 15 Hoyvík | Postsmoga 1155 | FO-110 Tórshavn | FAROE ISLANDS | Tel: +298 340 500 | savn.fo | savn @ savn.fo